# BARNA- OG UNGDÓMSVIRÐIR

# KLAKSVÍKAR KOMMUNA

# 2020



# VISJÓN

Okkara børn og ungu hava rætt til eitt gott lív. Tí vilja vit virka fyri einum tryggum umhvørvi við denti á trivnað, menning, samstarv og ávirkan.




# INNGANGUR

Við hesum virðum setur Klaksvíkar kommuna tað góða barna- og ungdómslívið á breddan. Øll hava rætt til eitt gott lív, og kommunan strembar við virðunum miðvíst ímóti at skapa karmar fyri hesum.

Virðini verða framd av viðkomandi starvsfólkum saman við teimum, sum varða av barninum, og tí unga. Foreldrini hava ábyrgd av barninum og tí unga og tess trivnaði, menning og læring, og kommunan er við til at skapa karmarnar.

Starvsfólk møta børnum og ungum við virðing og opinleika, og samstarva við foreldrini um trivnaðin hjá barninum og tí unga. Børnini og tey ungu skulu vera sædd og hoyrd. Tey skulu hava ávirkan og læra at taka ábyrgd av egnum lívi og felagsskapinum.

Børn og ung eiga at kenna seg trygg á stovnum og í tilboðum í kommununi. Hetta fremja vit við at vísa teimum virðing og umsorgan.

Her skulu vit skapa karmar fyri einum virknum útilívi. Almenn útiøki skulu virka sum savnandi umhvørvi, ið eru kveikjandi fyri rørslu og samveru, og har rúm er fyri øllum.

Dentur verður lagdur á at skapa møguleikar fyri nógvum ymiskum tilboðum til børn og ung.
Tey vaksnu hava ábyrgdina av, at slóðað verður fyri, at vit liva eftir virðunum.

Virðini taka útgangsstøði í barnarættindasáttmálanum og burðardyggari menning sambært Heimsmálunum hjá ST umframt galdandi lógum.

Virðini vera javnan endurskoðað.



# TRIVNAÐUR

Øll, ið eru um børn og ung frá viðgongutíð, skulu arbeiða við tí endamáli, at góð heilsa og trivnaður hava høga raðfesting.

Børn og ung skulu hava eitt stimbrandi umhvørvi, ið fremur trivnað, góða heilsu, menning og læring.

Vit skulu øll stremba eftir, at børn og ung kenna seg trygg í teirra uppvøkstri.

Børn og ung læra og mennast í felagsskapi við vaksnum og øðrum børnum og ungum.

Klaksvíkar kommuna vil virka fyri, at barnið fær eina jaliga lívsbyrjan, og skapa karmar fyri, at starvsfólkini eru væl útbúgvin og hava eina dagførda vitan.



## LÆRING OG MENNING

Børn og ung skulu ígjøgnum øll síni barna- og ungdómsár hava møguleika at menna sínar førleikar og evni. Vit skulu eggja teimum til at gagnnýta sínar gávur og geva teimum bestu fortreytir fyri einum góðum lívi.

Tí skulu børn og ung verða møtt av starvsfólkum, sum virka fyri teirra fjølbroyttu læru og menning, við útgangsstøði í førleikum og áhuga hjá tí einstaka.

Børn og ung skulu virðast sum einstaklingar við egnum virðum og meiningum. Samstundis skulu tey menna síni evni til samstarv og samveru.

Klaksvíkar Kommuna leggur dent á, at øll børn og ung fáa góðar karmar til læring og menning. Hin ungi skal hava møguleika fyri at mennast við arbeiði, skúla ella læruplássi.





# SAMSTARV OG SAMSKIFTI

Gott samstarv og samskifti hevur stóran týdning fyri at skapa bestu karmar fyri børn og ung. Tørvur er á góðum samskifti og viðkomandi kunning millum allar partar, ið varða av børnum og ungum.

Klaksvíkar kommuna vil virka fyri góðum samstarvi millum partarnar. Samstarvið skal vera merkt av, at barnið/hin ungi kann koma til orðanna og hava ávirkan á egin viðurskifti.

Klaksvíkar kommuna vil virka fyri einum høgum kunningarstøði, har borgarin lætt atkomuligt fær upplýst møguleikar og tilboð, sum venda sær til børn og ung.

Hetta verður gjørt á ymiskum samskiftispallum, har børn og ung ferðast.

Tað skal vera lætt at kunna seg um tilboð til børn og ung í kommununi.



## ÁVIRKAN OG ÁBYRGD

Tað er umráðandi, at børn og ung eru varug við, at tey hava ávirkan á egið lív og umstøður. Hetta virða vit í Klaksvíkar kommunu.

Tí vilja vit virka fyri, at børn og ung fáa møguleika at siga sína hugsan, kjakast, taka lut og taka ábyrgd á aldurssvarandi stigi. Við ávirkan fylgir ábyrgd.

Børn og ung skulu verða hoyrd, tá avgerðir, ið ávirka teirra lív og gerandisdag, verða tiknar.

Klaksvíkar kommuna ynskir at stimbra menning av góðum samborgarum, sum kenna sína ábyrgd og síni rættindi, og virka fyri einum áhaldandi savnandi og burðardyggum samfelag.



## UMHVØRVI OG KARMAR

Tað fysiska og sálarliga umhvørvi, ið vit bjóða okkara børnum og ungu, skal vera gott. Tað skal stuðla undir einum fjølbroyttum og mennandi gerandisdegi og skal endurspegla tað serstaka og lokala í okkara mentan.

Miðað verður ímóti, at fríøkir verða kring um í kommununi. Fríøkini skulu vera viðlíkahildin, kveikjandi og fjálg so børn og ung kenna seg væl.

Mentanarligt virksemi og list skulu hava góðar umstøður at virka.

Klaksvíkar kommuna skal vera við til at skapa karmar fyri ymsu frítíðartilboðini og vera við til at skipa fyri góðum samskifti og samstarvi millum partarnar.

Klaksvíkar kommuna skal tryggja skipaði ferðsluviðurskifti. Gonguteigar og farleiðir skulu verða týðiliga upplýst og frámerkt.







